# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO

*- Vit mugu jú rokna við, at teir helst fáa okkurt málið, og so eru vit eisini noyddir at skora*

*Sir Alex Ferguson*

# Pengar eru ikki alt



*Fagnaðurin var øgiligur, tá Kuyt hevði sent fjórða og seinasta brotssparkið hjá Liverpool í kassan*

*Mynd: Polfoto/AP*

**Við Abramovich í rygginum hevur José Mourinho havt størri tilfeingi enn nakar annar í fótbóltsheiminum at arbeiða við. Men hann hevur ikki siðvenjuna hjá Liverpool, og hon sigraði enn einaferð**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinasta vikan hevur ikki verið nakað serligt hjá José Mourinho.Leygardagintraðkaði Chelsea skeivt í seinasta svinginum í endaspurtinum í Premier League, har heitið nú mest sannlíkt endar á Old Trafford.

Og týskvøldið brast dreymurin um Champions League enn einaferð, tá Liverpool fyri sjeyndu ferð spældu seg í finaluna í europisku meistarakappingini í fótbólti.

Talan var um eitt brak av einum dysti. Chelsea hevði eina 1-0 leiðslu við sær frá fyrra dystinum, men stóri spurningurin var alla tíðina, hvussu langt hendan mundi røkka.

Klokkan segði, at hon rakk í 22 minuttir. Tá hevði danski Daniel Agger eftir snilt frísparksuppleggfrá Gerrard sent leðurkúluna niður við stólpan og inn um annars framúr væl spælandi Petr Cech í Chelsea-málinum.

So stóð á jøvnum, og tað gjørdi tað í á leið 100 minuttir afturat. Men hóast málini restaðu, so var dysturin á ongan hátt tannleysur. Knallharðir nærdystir, útlúgvaðir spælarar, framúr einstaklingaavrik og fram um alt veruligt fight.

### Møguleikarnir vóru til

Ikki minst var talan um sera gott og trygt málverjaspæl frá Pepe Reyna og Petr Cech. Cech var kanska tann, sum hevði mest at gera, men tá Liverpool hevði størstu møguleikarnar, spældi linjuverjin eisini við. Tvær ferðir veittraði hann Kuyt rangstaddan. Fyrru ferðina var rangstøðan helst ivasom, men tá misnýtti hollendingurin kortini. Seinnu ferðina sýndu sjónvarpsmyndirnar, at maðurin var nakrar sentimetrar rangstaddur, og tí var í lag, at málið varð kolldømt.

Chelsea hótti tó eisini nakrar ferðirnar. Ikki minst, tá Cole ta einu ferðina smoygdu sær at baklinjuni, men beint undan nøsini á Drogba fekk verjuleikari ruddað bóltin burtur.

Størsta møguleikan av øllum fekk Kuyt tó í yvirtíðini. Júst innskifti Fowler fann sera hegnisliga hollendska liðfelagan, men eftir 117 minuttir var møðin farin at gera um seg, og tí gjørdist skotið ikki harðari, enn gott er.

### Høvdu nervarnar

Tá tað ikki fekk verið øðrvísi, gjørdist tað neyðugt at avgera alt við skotum úr 11 metrum. Tað varð tosað um, at Chelsea kanska vóru hepnir, at hetta ikki gekk fyri seg framman the Kop – plássið hjá íðnastu Liverpoolfjepparunum. Men lítið er at ivast í, at teir bláu heldur vildu verið heima á Stamford Bridge til hesa royndina.

Sálarliga javnvágin koppaði í øllum førum til Liverpool, tá fyrst Robben og síðani Geremi misnýttu. Tí kundi Kuyt við fjórðu royndini hjá Liverpool senda bóltin í kassan, og so var frøin ovurstór. Fyri aðru ferði í trý ár og sjeyndu ferð íalt, er Liverpool í fínastu finaluni av øllum. Nú er einasti spurningurin, hvørt tað verða Milan ella Manchester United, sum verður mótstøðuliðið í Athen um tríggjar vikur.

# – Betra liðið tapti

Ikki óvæntað helt Jose Mourinho, at betra liðið tapti hálvfinaluna í gjár.

- Vit mugu sýna styrki í slíkum støðum. Men eg haldi, at betra liðið tapti. Í umdystinum haldi eg, at vit vóru einasta liðið, sum spældi fyri sigrinum, segði ein fáorðaður Mourinho eftir dystin.

Og heldur ikki óvæntað hevur tapið fingið ferð á gitingarnar um, at Mourinho er ávegis úr felagnum. Eftir trý ár við stýrisvølin hevur tað enn ikki eydnast honum at vinna størsta steypið av øllum. Hartil tykist Chelsea mest sum hava mist meistaraheitið, og eitt ár við bara Liga-Cup og møguliga FA-Cup er ikki nøktandi.

Rafael Benitez var hinvegin ovurfegin.

- Eg kundi ikki biðið um meira. Vit máttu ansa okkum væl, tí Chelsea hevur so vandamikið álop, men spælararnir gjørdu júst tað, sum varð kravt av teimum.

Og sjálvandi hevði hann serliga stórar rósur til málverjan hjá Liverpool.

- Pepe var serfrøðingur í brotssparkum, tá hann spældi í Spania, og teimum evnunum hevur hann ikki slept. Hetta er nakað, sum hann leggur stóra orku í at venja, og í kvøld sóu vit enn eitt dømi um, hvussu stór styrki hetta kann vera, segði Benitez.

**-mørk**

## FM í estetiskum fimleiki

**Leygardagin 5. mai verður kappast um føroyameistaraheitið í estetiskum fimleiki. Kappingarnar verða í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn**

FIMLEIKUR
*tíðindaskriv*

Føroyameistarakappingin er fyri pinkur, smágentur og kvinnur, og tað verða lið frá Ljósinum, Støkk og Havnar Fimleikafelag, sum fara á gólvið. Í januar kappaðust hesi somu liðini til steypakapping í estetiskum fimleiki, og tá var sera javnt millum feløgini, so tað verður sera spennandi at síggja, hvør fer avstað við føroyameistaraheitunum í ár.

Kappingin hjá pinkum og smágentum byrjar kl. 14, og kappingin hjá kvinnunum byrjar kl. 18. Atgongumerki fáast við dyrnar ein tíma áðrenn kappingarnar byrja.

## AB skal aftur í Gundadal

Eftur at hava sligið B36 úr steypakappingini, skal AB nú aftur royna seg í Gundadali

Lutakastið til fjórðingsfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið var mánakvøldið, og hesa ferð skal AB spæla á útivølli móti føroyameistarunum úr HB.

Og í aðrar mátar var talan um dystir, sum í stóran mun kunnu metast sum lokaluppgerðir.

Dystirnir í fjórðingsfinaluni verða spældir tann 17. mai, og eru teir hesir:

HB-AB
VB/S-TB
EB/S-ÍF
KÍ-Skála